# Listaframsýning og hugnaløta í skúlanum

**Fyrireikararnir av Fjarðastevnuni hava lagt serligan dent á at hava nøkur mentanarlig tiltøk við á stevnuni, og soleiðis verður Skála skúli karmur um bæði listaframsýning og hugnakvøld**

Fjarðastevna
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Á Fjarðastevnu verður Skála skúli karmur um listaframsýning leygardagin og sunnudagin – og síðan verður hugnaløta á skúlanum, tá ið listaframsýningin letur aftur sunnukvøldið*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Stevnurnar kring landið eru í stóran mun ítróttarstevnur – ella stevnur hjá ítróttarfólkunum, sum onkur hevur tikið til. Tó verður meira og meira gjørt burturúr at hava fleiri mentanarlig tiltøk av ymiskum slagi við á hesum stevnum.

Nú Fjarðastevna verður á Skála, hava fyrireikararnir lagt serligan dent á at hava nøkur mentanarlig tiltøk við á stevnuni.

## Listaframsýning

Leygardagin og sunnudagin verður soleiðis skipað fyri listaframsýning í skúlanum á Skála, har yngri – ella nýggjari – listafólk, sum hava tilknýti til Skálafjørðin, fara at sýna fram síni verk.

- Vit halda, at tað eru so nógvar framsýningar, har tey royndu listafólkini kunnu vera við, meðan tey lokalu og minni royndu hava trupult við at sleppa framat. Tí er henda framsýningin ætlað teimum, so hesi eisini kunnu sleppa at sýna fram síni listaverk.

Skála Ítróttarfelag veit at siga, at sjey listafólk verða við á framsýningini, og hesi hava millum 40 og 50 verk við.

- Eitt av listafólkunum seymar síni listaverk; hini seks mála, sigur felagið.

Framsýningin í Skála skúla verður opin leygardagin frá klokkan 15-20 og sunnudagin frá klokkan 15-19.

## Hugnakvøld

Tá ið listaframsýningin er latin aftur sunnukvøldið, verður hugnakvøld í skúlanum.

- Evnini á hugnakvøldinum verða bæði til gamans og álvara, og tað verður Jógvan Fríðriksson, prestur, sum fer at "stýra" góðu fólkunum, sum vit hava fingið at undirhalda gestunum.

Skála Ítróttarfelag sigur, at Kári P. Højgaard fer at hugleiða, og Anfinn Johansen fer at hava siðsøguligar hugleiðingar. Ungir skálamenn fara eisini at hava okkurt til skemtunar.

- Sangur og tónleikur verður eisini á skránni sunnukvøldið. Ung úr Meinigheitshúsinum fara at syngja nakrar sangir, og Óli Olsen fer eisini saman við vinmonnum at framføra nakrar sangir. Katrin Hovland Petersen, sum herfyri fekk virðisløn í tónleikakapping í Danmark, fer at spæla klassiskan tónleik á klarinet. So, her skuldi verið eitt sindur til øll, heldur Skála Ítróttarfelag.

Hugnakvøldið í skúlanum á Skála byrjar klokkan 20, og fyrireikararnir rokna við, at undirhaldið - til gamans og álvara – fer at vara í einar tveir tímar ella so.

Kostnaðurin er 100 krónur – og tá er kaffi og køkur við í prísinum.

